# Karmarnir og innihaldið ganga aftur

**Eftir at tað tey fyrstu fjøruti árini varð roynt og leitað við innihaldi og karmi í og kring steypakappingina, líkjast finalurnar alt meiri teimum undanfarnu. Hesa ferð er B36 favorittur, men GÍ hevur áður víst, at teir kunnu basa teimum bestu**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Steypakappingar plaga at hava sínar føstu karmar og ritualir. Eitt nú í Onglandi eru karmarnir kring og innihaldið í FA Cup finaluni so gróðursett siðvenja, sum hevur fingið so gott skoðsmál, at tey so nógva aðra staðni hava roynt at taka hetta til sín og kanska tillaga tað eitt sindur.

Í Føroyum hevur tað verið kappast í steypakappingini í fótbólti síðani 1955. Til og við 1988 varð kappast um eitt Ísafjarðarbikar og tríggjar Ísafjarðarsúlur. Navnið komst av, at tað var á Ísafirði í Íslandi, at bikar og súlur vórðu givnar føroysku fótbóltsfeløgunum at kappast um.

Tað ber ikki til at siga, at karmurin kring og innihald í kappingunum fram til og við 1988 vóru støðug og afturvendandi. Fyrsta skeiðið varð kappingin fleiri ár spæld í einum og sama vikuskifti, og liðini, sum vóru við í kappingini, skiftust um at hýsa henni. Onkra ferðina varð ásett, at tað skuldu spælast tvær finalur, soleiðis at bæði finaluliðini fingu ágóða av heimavølli. Okkurt skeiðið skuldi finalan verða spæld í høvuðsstaðnum, og aðrar ferðir varð tað mett týdningarmikið, at finalan varð løgd í plássum, har tey ikki vóru so von at síggja fótbóltsdystir á hægsta støði í Føroyum. Tí vóru finalur spældar eitt nú í Gøtu, á Sandi, á Skála og á Eiði.

Tey fyrstu árini stóð kappingin bara millum feløgini í bestu deildini. Men kappingin varð ikki so høgt í metum alla staðni, og tað kom meiri enn so fyri, at bara trý feløg – B36, HB og TB – kappaðust um Ísafjarðarbikarið. Seinni varð farið heilt í hina grøvina soleiðis at skilja, at tað onkra ferðina í sjeyti árunum var soleiðis, at øll liðini í øllum vaksnamanna deildunum kappaðust. Henda skipanin er framvegis galdandi í steypakappingini í hondbóltinum, men hon varð skjótt avtikin í fótbóltinum.

Bara í einum hevur føroyska steypakappingin mest sum alla tíðina líkst sær sjálvari. HB hevur vunnið meiri enn aðru hvørja ferð. HB eigur 25 steypasigrar. Tað vil siga, at eldra havnarfelagið hevur vunnið fleiri finalur, enn øll hini feløgini hava vunnið tilsaman. Tí hevur HB vunnið bikar og súlur til ognar. Í 1964 vunnu teir Ísafjarðarbikarið til ognar, og síðani hava teir vunnið tríggjar Ísafjarðarsúlur til ognar. Tað síðstu vunnu teir í 1988.

Síðani 1989 hevur verið kappast um Løgmanssteypið, og serliga eftir at vinnarin í 1991 umframt heiðurin og steypið eisini vann sær rætt at taka lut í UEFA Cup kappingini, hevur áhugin verið væl størri, enn hann frammanundan yvirhøvur hevði verið.

## Fastur karmur

Fótbóltssambandið hevur lagt seg eftir at gera innihaldið og karmin kring kappingina fastari og harvið meiri eyðkent, síðani tað varð farið at kappast um Løgmanssteypið. Nú stendur kappingin millum bestu liðini hjá øllum feløgunum, sum eru umboðað í 1. – 4. deild. Seinastu árini hevur verið kappast í bólkaumfari, og allar finalurnar um Løgmanssteypið hava verið í Gundadali.

Tey fyrstu árini varð nýggj finala spæld, um tað stóð á jøvnum eftir vanliga leiktíð og tvær ferðir fimtan minuttir longda leiktíð. Tríggjar ferðir hevur verið neyðugt við nýggjari finalu (B71 og HB í 1989 og í 1993 og GÍ og HB í 1996). Nú er hetta broytt soleiðis, at finalan skal avgerast ein og sama dag.

Fyri trimum árum síðani varð avgjørt, at finalan skuldi spælast á nýggja grasvøllinum í Gundadali, og fyri tveimum árum síðani varð fyrstu ferð roynt at spæla finalu Ólavsøkudag. Tað vil siga, at finalan hesa ferð er tann fjórða á grasvøllinum, og hon er tann triðja, sum verður spæld Ólavsøkudag.

Í fjør, tá ið NSÍ vann á HB, var veðrið framúr gott, og steypahýrurin kring vøllin var fínur. Í fyrraárið vann B36 á KÍ. Tá var veðrið so vánaligt, sum tað ikki hevur verið á Ólavsøku seinastu heilt nógvu árini.

Karmurin og innihaldið eru vorðin fastari og eyðkendari, síðani súlurnar vórðu skiftar út við steypið hjá løgmanni. Í fyrstu kappingini var vinnarin oftast tann sami, sum hann meiri enn aðru hvørja ferð var í kappingunum um bikar og súlur, sum komu úr Íslandi. Men hesi seinnu árini hevur hetta ikki verið soleiðis. HB vann fyrsta Løgmanssteypið til ognar í 1998 ella tíggjunda árið, sum tað varð kappast um steypið. Teir áttu fýra lutir í steypinum. KÍ og GÍ áttu tveir lutir í part, og B36 og B71 vunnu tað steypið eina ferð í part.

Síðani 1998 hevur HB ongantíð vunnið steypakappingina. KÍ, GÍ, B36 og NSÍ eiga eina aktiu í part í nýggja Løgmanssteypinum, og Ólavsøkudag fara GÍ og B36 at stríðast um, hvat av teimum báðum liðunum skal verða tað fyrsta at eiga tveir lutir í steypinum, sum tað sambært ásetingunum skal kappast um til og við 2008, um ikki onkur frammanundan hevur vunnið tað so mikið ofta, at eingin annar kann røkka teimum. Í løtuni er tað lítið, sum bendir á, at tað ikki fer at verða kappast um steypið í hvussu so er inntil 2008.

Anfinn Kallsberg fer fyri sættu ferð at handa Løgmanssteypið á Ólavsøku í ár. Um tað gongst, sum tað plagar at gera, so kann roknast við, at hann fer at handa steypið í hvussu so er á tveimum Ólavsøkum afturat. Men tað er ein heilt onnur søga, sum tað er eins torført at rokna út, sum tað er at spáa um, hvør fer at vera partur av finalunum tey komandi árini!

## Favoritturin viðhvørt snýttur

Um landskappingin verður nýtt sum grundarlag fyri vánunum í steypafinaluni, so er eingin ivi um, at B36 hesa ferð er stórfavorittur at vinna ímóti GÍ. B36 er oddalið í landskappingini, teir hava nógvar royndar spælarar, sum hava spælt nógvar landsdystir, hava ofta roynt seg í Europa Cup og hava fleiri ferðir vunnið bæði FM og steypakappingina, og teir hava nógv fólk at taka av.

Gøtumenn eru mitt í ættarliðsskifti. Tíðliga í vár tóktist tað at ganga rættiliga væl, men síðani hava teir verið nógv plágaðir av skaðum, og úrtøkan hevur ikki verið nakað serlig í landskappingini. GÍ er á sjeynda plássinum, og nógvir av spælarunum hjá teimum hava verri enn so somu royndirnar, sum mótstøðumenninir í finaluni hava.

Men ein av sjarmunum við steypafinalum er, at alt kann koma fyri ta løtuna, sum alt skal avgerast í. Síðsta dømið um hetta í føroysku steypakappingini var í 2000. Ta ferðina spældu HB og GÍ. HB var oddalið í landskappingini, og GÍ var nummar sjey. Men tað var GÍ, sum endaði omaná í steypafinaluni. Teir komu á odda í 1. hálvleiki, og HB megnaði ongantíð at sleppa av við skelkin.


*B36 er favorittur hesa ferð, men teir í B36, teir í GÍ og øll tey, sum ætla sær at fylgja við í finaluni vita, at í einari finalu kann alt koma fyri. Tí er tað bæði spennandi og sjarmerandi.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*






